gult2 cyan2 magenta2 svart2






gult3 cyan3 magenta3 svart3



# Tróndur Patursson fer á innlandsísin

**Ein tann fremsti listamaður okkara, Tróndur Patursson, fer á ferð á grønlendska innlandsísin um ein mánað. Í løtuni sýnir hann fram á við snarskivuna í miðbýnum**

LISTAFRAMSÝNING
*Stefan í Skorini*



*Tróndur Patursson hevur í hesum døgum hugvekjandi framsýning í snarskivuni. Í næstum fer hann eina ferð á grønlendska innlandsísin*

Í hølunum hjá býráðnum, har snarskivan heldur til, hevur Tróndur Patursson eina framsýning við sínum eyðkendu glasfuglum og fleiri málningum umframt.

– Teir flestu fuglarnir eru gjørdir til júst hesa framsýningina, og eg haldi, at teir rigga væl í hesum hølunum við nógvum glasi, sigur Tróndur Patursson.

Tróndur hevur glasfuglar hangangi undir loftinum og festar á glasið í endunum. Teir flestu málningarnir á vegginum eru vatnlitsmyndir, men eisini hevur hann nakrar tempramyndir, har hann hevur nýtt egg, mjólkaevni og ymisk sløg av harpiksi til at gera málningarnar. Hetta er ein tann elsti hátturin at gera myndir.

Framsýningin verður hangandi uppi í hálvan annan til tveir mánaðir.

Tróndur Patursson sigur annars um hølini, at tey eru sera væl egnað til framsýningar sum hesar, tí tey liggja so væl fyri miðskeiðis í býnum.

– Tað er hugaligt at koma í øðrum ørindum og so renna seg í eina listaframsýning. Ljósið er gott og hølini góð, sigur Tróndur.

## Ferð á innlandsísin

Tróndur Patursson er ein ævintýrari, og næsta ferð hansara er á grønlendska innlandsísin. Ferðin gongur til Scoresbysund í Eysturgrønlandi, og haðani fara teir á innlandsísin við bátum.

Ferðin hjá Tróndi verður gjørd saman við einum norðmanni, sum hann gekk í flokki við, tá hann gekk í skúlan í Noregi. Tveir aðrir norðmenn vera eisini við á ferðini.

– Hetta er ein ferð fyri at fáa íblástur. Vit hava tí tekniblokkin við okkum, og seinni skuldi okkurt verk sprottið úr hesi ferðini, sigur Tróndur.

Við sær hava teir tveir bátar úr aluminium, sum ikki viga meira enn 100 kilo hvør. Bátarnir hava luftkoddar og kunnu tí ikki søkka. Harumframt hava teir gangarar undir bátinum, so teir kunnu takast við á ísin.

Farið verður um ein mánaða, og teir skulu búgva í tjaldi.

Tróndur heldur, at hetta er ein góður møguleiki einum listamanni at fáa nýggjan íblástur.

– Ljósið er serligt á innlandsísinum. Sýnið er ógvuliga gott, og ljóst er alt samdøgrið. Blálýsi, sum eg havi arbeitt við í eini tjúgu ár, er eisini serligt har norði. Ísurin líkist eisini glasinum, men hevur fleiri litir, um hugt verður nærri eftir honum, greiðir Tróndur frá.

Tróndur og norðmenninir fara at búleikast á innlandsísinum uttan samband við umheimin í nakrar vikur.

# Hundabit ikki meldað

**Mikudagin varð ein 4 ára gomul genta í Vági illa bitin í andliti av einum hundi. Løgreglan í Suðuroy upplýsir, at tilburðurin ikki er meldaður**

HUNDABIT
*Stefan í Skorini*

Løgreglan í Suðuroy hevur onga fráboðan fingið um, at ein smágenta varð bitin av einum hundi. Um eingin fráboðan ella melding er komin, so ger løgreglan einki við málið. Løgreglan hevur tískil ikki avtikið hundin.

Vanliga mannagongdin er annars, at løgreglan skrivar sak um málið, og síðani skal fútin taka støðu til, um hundurin skal avtakast.

Lesið annars á blaðsíðu 4 um syndarliga tilburðin í Vági.

# Høgni Mikkelsen gjørt 100 hús

**Í dag, leygardagin, fer Høgni Mikkelsen at reisa hús nr. 100, sum hann hevur staðið fyri. Tað gongur skjótt fyri seg, tí longu nú eru 41 hús umbiðin afturat**

HÚSABYGGING
*Stefan í Skorini*



*Høgni Mikkelsen hevur latið 100 hús úr hondum, og fleiri eru eftir enn*

Hús nr. 100 hjá Høgna Mikkelsen standa á Løgmannabreyt, har eini 50 onnur hús hjá byggiharranum standa frammanundan. Hátíðarhald verður í sambandi við, at húsini verða reist leygarmorgunin klokkan 10.

Høgni Mikkelsen hevur fingist við húsabygging síðan 1981, tá hann fór undir at byggja tvíhús. Í 1989 fór hann so undir at byggja randarhús. Í árunum frá 1981 til 1992 bygdi Høgni 46 hús, men so steðgaði alt upp.

Ikki fyrr enn í 1998 kom gongd á aftur, og hann hevur saman við sínum arbeiðsmonnum bygt 54 hús seinastu trý árini. Hetta eru eini 18 hús um árið. Øll eru seld, og 41 hús eru umbiðin afturat.

– Eg havi altíð havt ein dreym um at náa at gera 100 hús, men undir kreppuni væntaði eg ikki, at eg fór at klára tað, sigur Høgni Mikkelsen.

Hann vísir á, at íbúðartrupulleikin í Havnini er stórur, og tað er grundarlagið undir hansara mongu húsum.

– Eg fái eini tríggjar uppringingar um dagin frá fólki, ið fegin vilja hava eini hús.

Høgni hevur fleiri byggiætlanir fyri framman. Fyri trimum árum síðani keypti Høgni Mikkelsen eitt øki Uti við Strond við Boðanes. Har hevur hann ætlanir um at byggja enn fleiri hús, so kanska hann klárar at gera 200.

Høgni hevur 13 mans í arbeiði, men fleiri teirra eru ofta í skúla, og tí eru ikki fleiri enn átta til arbeiðis í senn. Høgni hevur lagt seg eftir at gera lítil og bílig hús, og eftirspurningurin er stórur.


# HÚS NR. 100

## hjá Sp/f Høgna Mikkelsen

# Móttøka

í sambandi við at vit reisa hús nr. 100 leygardagin tann 23. juni verður móttøka í HB-húsinum frá kl. 19.00-22.00

**Sp/f Høgni Mikkelsen**